Dagsins spurningur: Kann man loypa seinasta kapitulin um í eini bók?
**Maður, 45 ár**

# Miðlamiðjarr

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



*Gaddafi kunngjørdi, at hann vildi ikki vísa sínum fólki náði. Hann samanlíknaði tey við rottur og hótti við, at hann fór at ganga hurð til hurð og revsa tey.*
Obama forseti um orsøkina til, at USA og onnur lond løgdu upp í stríðið í Libya



So mistu vit tveir tímar í kvøld. Ein til Earth Hour og ein til summartíð.
**Maður, 45 ár**

*Eg haldi ikki, eg gangi í barndømi, og eg hugsi klárari enn nakrantíð*
Heine O. Heinesen, 72 ára gamal løgtingsmaður, ætlar sær at stilla uppaftur á komandi løgtingsvali (Kringvarp.fo)



*Eg fái ikki sagt nakað beint nú. Tað er púra vilt. Hetta hevur verið ein fantastisk ferð.*
Sarah eftir at hon vann donsku X Factor kappingina (BT)



*Tað er órógvandi, at so nógv siga seg hava koyrt bil, tá tey kunnu hava verið ávirkað.*
Sølvi Reinert Hansen, stjóri á Ferðslutrygd. Næstan fimti hvør føroyingur heldur seg hava koyrt við ov høgari promillum seinasta árið.



*Tá ið tú veruliga ikki dámar eitt mannfólk, so hongur hann uppi í tær. Beinanvegin tú letur sum um tær dámar hann, so er hann ikki longur áhugaður í tær.*
Lívsvísdómur hjá song-kvinnuni Beyonce



*So hvørt sum tú betur veitst, hvør tú veruliga ert, veitst tú eisini betur, hvat er gott fyri teg.*
Talkshow-verturin Oprah Winfrey.

Nýmótans omman.... hon sendir smsboð til ommusynirnar og boðar frá, at pannukøkurnar standa á borðinum.
**Kvinna, 34 ár**

Nú byrji eg rættuliga at missa lystin til alt, sum hevur við grind til matna at gera.
**Maður, 53 ár**